## Flindt-Bjerg vann

Odd Grenland spældi í gjárkvøldið týðandi botndyst imóti Start í norsku Tippuliguni. Odd Grenland skuldi vinna fyri at varðveita vónina um at yvirliva í deildini, og tað eydnaðist. Odd Grenland skoraði tvey mál í fyrra hálvleiki, og tað var nóg mikið til at vinna dystin. Start liggur nú fýra stig frammanfyri Odd Grenland áðrenn seinastu tvey umførini. Kravið til liðið hjá fyrrverandi KÍ-venjaranum Ove Flindt-Bjerg er sigur í báðum teimum seinastu dystunum.

## Laudrup fekk hol á

Danski fótboltsvenjarin Michael Laudrup er komin undir trýst í starvi sínum sum venjari fyri spanska felagið Getafe. Orsøkin er, at liðið ongan dyst hevði vunnið í fyrstu sjey umførunum av sponsku kappingini. Í gjárkvøldið lætnaði eitt sindur hjá Laudrup, tí Getafe vann 2-0 á heimavølli ímóti Murcia. Getafe liggur tó framvegis á niðurflytingarplássi í Primera Division.

# Räikkönen gjørdi bart

**Mest spennandi kappingarár í formil 1 í nýggjari tíð endaði í gjár við eini koyring, ið var á tremur við drama og spenningi. Fyri McLaren-Mercedes liðið og teirra koyrarar, Lewis Hamilton og Fernando Alonso, var vónbrotið stórt, meðan Kimi Räikkönen tók heimsmeistaraheitið og vísti, at Ferrari valdi rætta mannin at avloysa sjeyfalda heimsmeistaranum, Michael Schumacher.**

*Nýklakti heimsmeistarin í formil 1 lat sjampanjuna fossa*

*Mynd: Polfoto*

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Kimi Räikkönen er heimsmeistari í formil 1, við sigri í brasilsku koyringini á Interlagos breytini, tryggjaði finnin, ið mikudagin gjørdist 28 ár, sær meistaraheitið, bert eitt stig framman fyri teir báðar McLaren koyrararnar Lewis Hamilton og Fernando Alonso.

Koyringin á Interlagos breytini, var óvanliga dramatisk, og sum fjeppari av formil 1, var hetta ein av mínum størstu upplivingum frammanfyri sjónvarpsskíggjan.

### Øll eygu vend móti Interlagos

Spenningurin um heimsmeistaraheitið var stórur, eftir óvæntaða úrslitið í seinastu koyring, tá oddafiskurin í kappingini um heimsmeistaraheitið, Lewis Hamilton koyrdi av breytini. Tí vóru øll formil 1 áhugaði eygu vend móti Interlagos breytini, har teir 22 formil 1 koyrararnir kappaðust í bakandi hita, luftin var 36 hitastig, meðan asfaltið var 65 hitastig.

Lewis Hamilton var enn á odda í kappingini um heimsmeistaraheitið. Hann hevði fýra stig niður til liðfelagan, Fernando Alonso og sjey niður til Kimi Räikkönen, við einans tíggju stigum at kappast um, var spenningurin stórur.

### Lewis Hamilton favorittur

Felipé Massa hevði í tíðarkoyringini á heimabreyt síni, koyrt skjótasta umfarið í sínum Ferrari bili. Hann hevði ikki longur møguleika at gerast heimsmeistari, men vísti, at hann ikki skal vera undimettur komandi ár. Lewis Hamilton gjørdi eisini sítt leygardagin, og byrjaði á øðrum plássi framman fyri Kimi Räikkönen og Fernando Alonso. Tað tyktist tí sera sannlíkt, at ungi bretin fór at skapa sensatiónina og vinna meistaraheitið í sínum fyrsta kappingarári.

### Alt gekk galið

Men Hamilton fekk sera ringa byrjan á koyringina, bæði Kimi Räikkönen og Fernando Alonso fóru beinanvegin framvið honum. Hetta setti eyka trýst á Hamilton, ið ikki megnaði at standa móti trýstinum og koyrdi av breytini og fleiri bilar fóru framvið honum, áðrenn hann á áttanda plássi kom aftur á breytina. Men Hamilton, vísti hví hann longu er vorðin størsta stjørnan í hesi ítróttargreinini. Hann var eftir sjey umfør á fimta plássi, og lá aftur til at gerast heimsmeistari. Men knappiliga fekk hann tøkniligar trupulleikar við gearkassanum, og datt aftur á tjúgunda pláss, bilurin koyrdi sera spakuliga runt á breytini, men líka knappliga riggaði bilurin aftur, og Hamilton fekk ferð á. Hann fór undir at stríða seg uppaftur gjøgnum feltið. Í eini desperatari roynd at hjálpa honum, umskipaði liðið hansara pittsteðgi strategi til tríggjar steðgir, í mun til teir báðar, ið øll hini brúktu. Strategiin var rættiliga burturvið, og kostaði hetta Hamilton nógva tíð. og at enda misti Hamilton seinasta møguleikan fyri at klára at fáa fimta plássið, ið kundi givið honum heimsmeistaraheitið

### Alonso fekk ikki avbjóðað

Meðan Lewis Hamilton stríddi seg upp gjøgnum feltið, misti Fernando Alonso einu løtuna triðja pláss til Robert Kubica í BMW. Hóast hann at enda vann triðja plássið aftur, megnaði hann als ikki at avbjóða Ferrari. Hann var stutt sagt ikki nóg skjótur á degnum.

### Kimi heimsmeistari

Kimi Räikkönen var komin úr fyrsta svingi á øðrum plássi, beint aftan fyri liðfelagan Felipe Massa og frammanfyri Fernando Alonso. Hetta annað pláss lá hann á til annan pittsteðg, tá hann megnaði at koyra longur enn liðfelagin Felipe Massa, og vann neyðugu sekundini fyri at taka fyrsta plássið. Væl koyrt av Kimi Räikkönen, ið eftir seks ár í formil 1 og tveimum øðrum plássum í kappingini um heimsmeistaraheitið, endiliga er vorðin heimsmeistari. Ferrari hava av sonnum funnið avloysaran til Michael Schumacher og í Finlandi og í Italia var veitsla í gjárkvøldi.

### Formil 1 vann

Hóast tað kendist óvanliga órættvíst, at Hamilton misti heimsmeistaraheitið í síðstu løtu, so er eingin ivi um, at hetta kappingarárið hevur vakt áhugan fyri formil 1 aftur, og vit kunnu bara gleða okkum til komandi kappingarár, ið fer av bakkastokki í mars.

### Heimsmeistaraheitið í formil 1 fyri lið eftir 17. og seinasta umfarið

| Nr | Lið | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Ferrari | 204 |
| 2 | BMW Sauber | 101 |
| 3 | Renault | 51 |
| 4 | Williams-Toyota | 33 |
| 5 | Red Bull-Renault | 24 |
| 6 | Toyota | 13 |
| 7 | STR-Ferrari | 8 |
| 8 | Honda | 6 |
| 9 | Super Aguri-Honda | 4 |
| 10 | Spyker- Ferrari | 1 |
| - | McLaren-Mercedes* | |

*McLaren-Mercedes varð dømt til at missa øll síni stig í kappingini um HM fyri lið, fyri at hava njósnað móti Ferrari. Bilførarnir hjá liðnum fáa stig, men hesi telja bara ikki við í liðkappingini. Tey 218 stigini, ið Hamilton og Alonso hava fingið, fella heilt burtur í kappingini fyri lið

### Brasilska formil 1 koyringin á Interlagos breytini

| Úrslit | Navn | Lið | Tíð/givin | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kimi Räikkönen | Ferrari | 1:28:15.270 | 10 |
| 2 | Felipe Massa | Ferrari | +1.4 sekund | 8 |
| 3 | Fernando Alonso | McLaren-Mercedes | +57.0 sekund | 6 |
| 4 | Nico Rosberg | Williams-Toyota | +62.8 sekund | 5 |
| 5 | Robert Kubica | BMW | +70.9 sekund | 4 |
| 6 | Nick Heidfeld | BMW | +71.3 sekund | 3 |
| 7 | Lewis Hamilton | McLaren-Mercedes | +1 umfar | 2 |
| 8 | Jarno Trulli | Toyota | +1 umfar | 1 |
| 9 | David Coulthard | Red Bull-Renault | +1 umfar | |
| 10 | Kazuki Nakajima | Williams-Toyota | +1 umfar | |
| 11 | Ralf Schumacher | Toyota | +1 umfar | |
| 12 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | +2 umfør | |
| 13 | Vitantonio Liuzzi | STR-Ferrari | +2 umfør | |
| 14 | Anthony Davidson | Super Aguri-Honda | +3 umfør | |
| Givin | Adrian Sutil | Spyker-Ferrari | Bremsur | |
| Givin | Rubens Barrichello | Honda | Motorur | |
| Givin | Heikki Kovalainen | Renault | Óhapp | |
| Givin | Sebastian Vettel | STR-Ferrari | Hydraulikkur | |
| Givin | Jenson Button | Honda | Motorur | |
| Givin | Mark Webber | Red Bull-Renault | Gearkassi | |
| Givin | Sakon Yamamoto | Spyker-Ferrari | Samanstoytur | |
| Givin | Giancarlo Fisichella | Renault | Samanstoytur | |

### Heimsmeistaraheitið í formil 1 fyri koyrarar eftir 17. og seinasta umfarið

**Støða**

| Koyrari | Land | Lið | Stig |
|---|---|---|---|
| Heimsmeistari Kimi Räikkönen | Finland | Ferrari | 110 |
| 2 Lewis Hamilton | Bretland | McLaren-Mercedes | 109 |
| 3 Fernando Alonso | Spania | McLaren-Mercedes | 109 |
| 4 Felipe Massa | Brasilia | Ferrari | 94 |
| 5 Nick Heidfeld | Týskland | BMW | 61 |
| 6 Robert Kubica | Póland | BMW | 39 |
| 7 Heikki Kovalainen | Finland | Renault | 30 |
| 8 Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 21 |
| 9 Nico Rosberg | Týskland | Williams-Toyota | 15 |
| 10 David Coulthard | Skotland | Red Bull-Renault | 14 |
| 11 Alexander Wurz | Eysturríki | Williams-Toyota | 13 |
| 12 Mark Webber | Australia | Red Bull-Renault | 10 |
| 13 Jarno Trulli | Italia | Toyota | 8 |
| 14 Sebastian Vettel | Týskland | STR-Ferrari | 6 |
| 15 Jenson Button | Bretland | Honda | 6 |
| 16 Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 5 |
| 17 Takuma Sato | Japan | Super Aguri-Honda | 4 |
| 18 Vitantonio Liuzzi | Italia | STR-Ferrari | 3 |
| 19 Adrian Sutil | Týskland | Spyker-Ferrari | 1 |